# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Cristiano Ronaldo hevur ikki verið heilt so flúgvandi í ár, sum hann var tað í fjør. Men í gjárkvøldið vísti hann seg aftur frá síni bestu síðu, og við tveimum málum átti hann sín stóra lut í trygga sigrinum hjá ensku og europisku meistarunum*
*Mynd: Polfoto/AP*

# United er aftur í finaluni

**Manchester United vann tryggan sigur á Arsenal, sum vóru sjáldsama tamir á heimavølli**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eina spennandi seinnu hálvfinalu millum Arsenal og Manchester United á Emirates Leikvøllinum í London. United vann fyrru hálvfinaluna 1-0, og tí var mett, at Arsenal sum einki mál hevði latið inn á heimavølli í hesari Champions League kappingini, hevði ein góðan møguleika at koppa United.

Men tá teir 90 minuttirnir vóru farnir, hevði Arsenal-málverjin, Manuel Almunia, latið tríggjar bóltar inn í Arsenal-málið.

Arsenal var langt frá tí fulla potentialinum í stórum pørtum av dystinum ígjár, og vóru teir sjáldsama tamir í mun til dygdirnar, teir eiga á vøllinum. Manchester United vann 3-1 ígjár, og sostatt ein samlaðan 4-1 sigur.

## Dreymabyrjan

Manchester United fekk eina dreymabyrjan, longu tá átta minuttir vóru farnir av dystinum. Ungi vinstri bakkurin hjá Arsenal, Kieran Gibbs gleið, og stríðsfýsni koreanarin hjá United, Ji-Sung Park, tók stundisliga av møguleikanum, og hann setti bóltin til høgru fyri Manuel Almunia og í netið til 1-0.

Tríggjar minuttir seinni økti Cristiano Ronaldo um leiðsluna. Portugisn skeyt eitt skot úr 36 metra fjarstøðu. Eitt skot, sum Almunia í Arsenal-málinum burdi tikið.

Arsenal, sum annars hevði lagt hart út, var nú fullkomiliga tikið av fótum, og mótbrekkan var longu sera tung hjá tí unga, evnaríka London-liðnum. Stutt aftaná 2-0 málið hevði Ronaldo aftur eina góða roynd á Arsenal-málið, men hesaferð var Almunia vakin og bjargaði fyri. Arsenal hevði bóltin nógv, men tað var United sum skapti teir stóru málmøguleikarnar.

## United byrjar betur

United byrjaði betri í seinna hálvleiki. Tíðliga í seinna hálvleiki fór Ronaldo framvið Johan Djourou, og skeyt eitt gott skot ímóti málinum, men Almunia bjargaði aftur.

Spanski málverjin hevði kortini ongan møguleika at bjarga, tá United skoraði til 3-0. Ronaldo hælaði bóltin til Ji-Sung Park, sum spældi bóltin víðari til Wayne Rooney. Rooney spældi bóltin víðari til Ronaldo, sum tá hevði runnið 70 metrar oman eftir vøllinum, fyri at vera við í álopsstøðuni.

Einsamallur við Almunia sveik Ronaldo ikki, og hann buldraði bóltin upp undir nettakið úr 12 metra fjarstøðu.

Tá byrjaðu fleiri av heimaáskoðarunum at rýma, og dysturin var í roynd og veru avgjørdur.

Tá 75 minuttir vóru farnir bleiv Darren Fletcher vístur av vølli, fyri eina takling á Cesc Fabregas. Fletcher hevði samband við bóltin, men hann kom samstundis at fella Fabregas.

Dómurin dømdi brotsspark, og gav Fletcher tað reyða kortið. Robin van Persie sendi brotssparkið upp í vinstra málhorn, uttan møguleika fyri Edwin van der Sar í United-málinum at bjarga.

Fabregas fekk ein stóran møguleika stutt undan leikloki, men hann tók ikki av, tá hann var spældur fríur.

United er sostatt klárir til Champions League finaluna, sum verður spæld á olympiska leikvøllinum í Rom, mikukvøldið 27. mai klokkan 19.45 føroyska tíð.

Spurningurin er so, um vit fáa eina endurtøku av finaluni millum Manchester United og Chelsea í fjør, ella um talan verður um eina endurtøku av finaluni millum steypavinnarnar í 1991, tá Manchester United og Barcelona møttust í finaluni?




*Nógvir fótbóltsviðmerkjarar hildu eryða kortið vera skeivt, men føroyski altjóða dómarin er ikki í iva um, at Darren Fletcher mátti av vøllinum fyri neyðbremsuna móti Fabregas*
*Mynd: Polfoto/AP*

## Eingin ivi um útvísing

Umframt at vera føroyska umboðið á altjóða fótbóltsdómaralistanum er Petur Reinert eisini trúgvur Manchester United-fjeppari.

Men spurdur um reyða kortið, sum Darren Fletcher fekk í gjárkvøldið, er hann als ikki í iva um, at kenslurnar mugu víkja.

- Har er einki at rafla um, og hatta var órutinerað av Fletcher. Tað kann væl vera, at hann letur mannin skora, um hann einki ger. Men við at gera brotssparkið, letur hann eisini Arsenal skora, umframt at hann fær reytt kort. Hevði dysturin riðið um snarið, kundi eg skilt tað, men har eru teir á odda 3-0, so hatta var býtt, sigur Petur Reinert.

*So tú ert ikki í iva um, at Roberto Rosetti tók røttu avgerðina, tá ostaskorpan varð drigin fram?*

- Alt ikki. Hatta er ein av heimsins bestu dómarum, og læt hann hatta fara framvið í eini hálvfinalu í Champions League, kundi hann gloymt alt um at sloppið at dømt nakra finalu aftur. Hann hevur heilt víst hugsað um, hvussu synd hetta er fyri Fletcher, men samstundis hevur hann vitað, at gav hann ikki reytt kort, hevði tað verið synd í Roberto Rosetti. So ja. Eg eri púra sannførdur um, at hatta var rætta avgerðin hjá dómaranum, sigur Petur Reinert.

**-mørk**